Damfar
Lifandi góðgæti

**GOYMSLUMAÐUR**

Til goymslu okkara sóknast vit eftir goymslumanni.

Arbeiðið umfatar alt vanligt goymsluarbeiði og at koyra vørur út til kundar okkara.
Tað er fyrimunur at tú hevur tað stóra koyrikortið.

Tú kann byrja beinanvegin, men vit bíða gjarna eftir tí rætta manninum.

Skrivlig umsókn skal sendast til okkum innan 17 februar 2006.

Blíðar heilsur

**DAMFAR P/F**
**Postboks 268**
**110 Tórshavn**

Atlantic Brokers Ltd

## Ísfiskatrolarin WESTBAY fyrrverandi DALENNI



er til sølu .Nærri fæst at vita við at venda sær til:

**Atlantic Brokers**
tel.: 312238 / 512238
sc@atlantic-brokers.com
www.atlantic-brokers.com




**TIL LEIGU**

140 fermetrar av miðhæddini í hesum bygningi í Jónas Broncksgøtu er til leigu.

Hølini hava verið nýtt til ymisk endamál.

Lat okkum fáa eitt prát um tykkara ynskir.

**Tel 211405 - 312609**
**Meinhard Dam**

# TIL SØLU



**HONDA**
**TRANS ALP 600 V**
Árg: 1987
Km: -
**Prísur: 15.000,-**



**SUZUKI**
**GSX 750**
Árg: 1981
Km: 28.000
**Prísur: 17.000,-**



**YAMAHA**
**VENTURE 1200**
Árg: 1984
Km: 39.000
**Prísur: 32.000,-**



**YAMAHA**
**VIRAGO 1100**
Árg: 1992
Km: 39.000
**Prísur: 35.000,-**



**MERCEDES**
**240 D**
Árg: 1969
Km: -
**Prísur: 35.000,-**



**MERCEDES**
**450 SEL**
Árg: 1978
Km: -
**Prísur: 24.000,-**



**MERCEDES**
**300 TURBO DIESEL**
Árg: 1981
Km: -
**Prísur: 15.000,-**

Prísirnir eru úr Danmark,
tvs. uttan avgjøld osv.

FOLMERS MC
FOLMERS AUTO

TEL +45 6538 2497
FAX +45 6538 3848

www.folmersmc.dk www.folmersauto.dk

# Ungdómsvenjari

Søkt verður eftir einum ungdómsvenjara til Hondbóltsfelagið Tjaldur til komandi kappingarár 2006/2007.

Um tit hava nakað at spyrja um, kunnu tit ringja til Eiler Einarson, tlf. 748176 og 448176.

Skrivlig umsókn kann sendast til:

**Hondbóltsfelagið Tjaldur**
Postboks 79
600 Saltangará

Fróðskaparsetur Føroya

# Ph.D.-lestrarstarv í leitingarjarðalisfrøði

Søkt verður eftir Ph.D.-kandidati til verkætlan innan jarðalisfrøði, við serligum atliti at leiting og útvinning av kolvetni, at byrja skjótast gjørligt. Ph.D.-kandidaturin verður settur á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetri Føroya í 3 ár, og skal verja arbeiði sítt fyri Ph.D.-gradina innan fyri hetta tíðarskeiðið.

Í Ph.D.-verkætlanini verður dentur lagdur á føroysku jarðfrøðina, harímillum avbjóðingina frá basaltinum í samband við leiting eftir kolvetnisgoymslum á føroyska økinum. Av granskingarevnum í Ph.D.-verkætlanini kunnu m.a. nevnast:

Betur amboð til seismiska prosessering og tulking av hvat er undir basaltinum
Anisotrop prosessering
Fleirkomponent prossesseringsamboð
Tilrættislegging av mátingum við atliti at goymslum undir basaltinum.

Ein meiri útgreinað lýsing (á enskum) av Ph.D.-lestrarstarvinum sæst her:
http://www.nvd.fo/fileadmin/pdf/PhDcandidateAdvertisement.pdf

Ein partur av Ph.D.-lestrarstarvinum fevnir um at taka ymisk skeið og luttaka á ráðstevnum og verkstovum. Dentur verður lagdur á at hava gott samband við altjóða viðurkend granskingarumhvørvi, og tí má tann, ið settur verður, rokna við styttri ella longri tíðarskeiðum á læru- ella granskingarstovnum uttanlands.

Umsøkjarar til Ph.D.-lestrarstarvið skulu hava prógv sum M.Sc. í jarðalisfrøði ella nærliggjandi fakøki sum t.d. jarðfrøði, kolvetnisverkfrøði, alisfrøði, teldufrøði ella støddfrøði. Tó eru tey, ið eru ávegis at gera M.Sc.-ritgerð, eisini vælkomin at søkja.
Setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya. Umsóknarfreistin er 13. mars 2006. Umsóknir við prógvum, ævisøgu (curriculum vitae), viðmælum og møguligum greinum skulu sendast í 4 eintøkum til:

**Fróðskaparsetur Føroya**
J. C. Svabos gøta 14,
Postrúm 272
FO 110 Tórshavn

Meira fæst at vita um verkætlanina við at venda sær til Jim Brown, professara, á teldupostadressuni rjbrown@setur.fo ella tlf. 352557.

# Ársaðalfundur

Fornminnisfelagið í Nes kommunu heldur ársaðalfund í gamla prestagarðinum á Nesi

**leygardagin 18. februar 2006 kl. 15.30**

Skrá sambært lógum felagsins.

**Nevndin**